# Trølla Pætur fingið heimasíðu



Leygardagin vitjaðu Trølla Pætur og Omma hansara BR, har tey kunnaðu børnini um teir nýggju heimasíðu www.tp.fo - Nógv fólk vóru komin saman í BR leygardagin, tá Trølla Pætur og Trølla Omman vóru á vitjan. Umframt at skriva autografar á mateskjur, so løgdu trøllini fram teirra nýggju heimasíðu. Trølla Pætur greiddi frá, hvat man kundi síggja á heimasíðuni og hvussu hon virkaði, meðan Trølla Omman alla tíðina hevði stuttligar viðmerkingar. Heimasíðan er løtt at brúka, og har er nógv spennandi á. Umframt spøl, so eru eisini filmsbrot og sangir hjá trøllunum. Eisini eru uppskriftir, tekningar, myndir o.a. stuttligt. Fólkini aftan fyri Trølla Pætur ætla at brúka orku at dagføra hesa heimasíðu, og meiningin er, at alt sum hevur nakað við trøllini at gera, kann síggjast á har inni. Síðan eitur www.tp.fo




















